STUTT SAGT

## Burtur við hjáveiðuni

Óynskt hjáveiða av toski og upsa í svartkjaftafiskiskapinum hevur seinnu árini til tíðir verið ein trupulleiki hjá skipunum, sum fiska svartkjaft við flótitroli.

Serliga er hjáveiðan at fáa í føroyskum og íslendskum øki. Longur suðuri, m.a. vestan fyri Írland og í altjóða sjógvi er veiðan so at siga bara svartkjaftur.

Samlaða veiðan av svartkjafti í føroyskum øki var 435.000 tons í 2004. Føroyska veiðan í 2004 var íalt 317.000 tons.

Kanningar hjá fiskirannsóknarstovuni vísa, at hjáveiðan av upsa í føroyskum øki í novemberdesember er 3,2%, millum 0 og 20%. Í mai-juni var hjáveiðan í føroyskum øki 2,2%, millum 0,6 og 14,9%.

Aðrar kanningar í Íslandi og Føroyum vísa, at hjáveiðan av upsa í føroyskum øki í miðal er um 1%. Av toski var hjáveiðan minni. Í íslendskum øki er hjáveiðan av upsa og toski størri enn í føroyskum øki.

Fyri at sleppa undan hesari hjáveiðuni vóru royndir gjørdar í 2004 og 2005 við at hava skiljirist í trolinum fyri at skilja upsan og toskin út úr trolinum og fáa svartkjaftin í trolposan. Hesar royndir hava eydnast væl.

Við at nýta rist verður so gott sum allur upsin og toskurin skildur út úr trolinum. Lítið og einki av svartkjafti fer út saman við.

Royndirnar í føroyskum og íslendskum øki við skiljirist í svartkjaftatroli vísa, at við rist í trolinum kann sleppast av við 95% av tí óynsktu hjáveiðuni uttanat missa meira enn uml. 1% av svartkjafti út saman við.

*Kelda: Fiskirannsóknarstovan*

# Skiljiristin er effektiv



*– Íslendingar hava krav um skiljiristir. Tað áttu føroyingar eisini at gjørt, sigur Heri Henriksen, 1. stýrimaður umborð á Atlatnic Navigator*




*Kristian Zachariassen hevur arbeitt við h… World Wildlife Fund gav honum virðislø… hevði í roynd og veru gloymt alt um tað. … fingið "runner-up"-prísin. - Tað er altíð … her vísir fram ristina á samkomuni í Brús…*

**Atlantic Navigator er ein av trolarunum, sum hevur roynt nýggju skiljiristina. Har umborð siga teir, at royndirnar hava verið góðar – so góðar, at hesar áttu at verið kravdar í Føroyum**

SKILJIRIST
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vónin, Fuglafjørður:** – Vit eru nógv meiri effektivari, tá vit hava brúka hesa nýggju skiljiristina.

– Nú kunnu vit arbeiða munandi skjótari, men við minni fólki, sigur Heri Henriksen, sum er 1. stýrimaður umborð á verksmiðjutrolaranum Atlantic Navigator.

Saman við øðrum monnum, sum hava gjørt royndir við skiljiristini, var Heri somuleiðis við á samkomuni í gjár, tá kunnað varð um nýggja amboðið í fiskivinnuni.

Á fundinum varð lagt fram um arbeiðið við at menna hesa ristina, eins og greitt varð frá teimum møguleikum sum liggja í fiskiskapi við eini tílíkari rist.

Á samkomuni var sjálvandi eisini Kristian Zachariassen

### Við rist og myndatóli

Sum stýrimaður umborð á hesum nýggja og væl útgjørda trolara okkara, hevur Heri stóran áhuga fyri menningini innan alt tað, sum hevur við fiskivinnu – og serliga svartkjaft – at gera.

Fyri tveimum árum síðani hoyrdist, at menn vóru farnir undir at gera royndir við eini skiljirist umborð á Christiani í Grótinum.

Hesar royndirnar við eini stálrist góvu ikki tað ynskta úrslitið, men í fjør sá út til at teir vóru komnir á rætta leið í hesum spennandi arbeiðinum.

Í september mánaði í fjør varð henda nýggja skiljiristin roynd umborð á Nærabergi, har eisini Christian Zachariassen sjálvur var við í einar tríggjar vikur.

Við sær høvdu teir eisini eitt myndatól, sum varð fest í trolið. Á henda hátt kundu teir síggja, hvussu ristin virkaði og høvdu samstundis møguleikan at gera tær broytingarnar og tillagingarnar, sum vóru neyðugar.

– Eftir hetta royndu vit í eina heilan mánað við hesi ristini. Og tá riggaði hon bara væl.

– Úrslitið er so tað, sum vit eru komnir til í dag, sigur Heri Henriksen.

### Effektivari

Í dag er støðan hon, at Atlantic Navigator er einasti framleiðslutrolarin í føroyska flotanum.

Fyri maningina umborð á Navigator hevur hetta verið til stóra nyttu og hevur lætt munandi um arbeiðið á verksmiðjuni.

Hendi tað, at teir fingu nógvan upsa í einum háli, var neyðugt hjá teimum at hava fólk standandi til at taka upsan burturúr.

– Hetta sleppa vit undan í

## Ikki kravt – enn

Hóast allir partar eru samdir um, at skiljiristin er eitt sera hent amboð, er hetta enn ikki eitt krav umborð á føroyskum skipum.

Tað er neyvan nakar trupulleiki at fáa skipini at brúka hesa ristina, tí tey sjálvi ynskja tað. Men so leingi tað ikki er eitt lógarkrav, verða tað bara ávísir trolarar sum fara at brúka hesa.

Hví hetta ikki enn er vorðið eitt krav hjá okkum er ein politiskur spurningur. Í Íslandi hevur tað verið krav í fleiri ár. Hugsandi er, at eitt slíkt krav kann ávirka samráðingar okkara við russar – negativan veg! – tá talan er um fiskirættindi í Barentshavinum.

## Fyrispurningar úr útheimi

Tað gingu ikki nógvir dagar frá tí, at Kristian Zachariassen hevði fingið virðisløn sína, fyrrenn telefonin byrjaði at kima hjá Vónini í Fuglafirði.

Stutt undan framløguni fyrrapartin í gjár fekk Vónin enn ein fyrispurning um luttøku á eini fiskivinnuframsýning í Norðurnoregi. Eisini úr USA er áhugi fyri skiljiristini.

Lítil ivi man vera um, at henda skiljiristin fer at hava stóran áhuga hjá reiðarum og dekkarunum kring allan heimin.

Vónin hevur fingið patent uppá hesa. Nú er so bert spurningurin, um teir fáa møguleika at fara undir stórframleiðslu av hesi skiljiristini.